

# Føroya Kærustovnur

## Ársfrágreiðing
## 2010



Ársfrágreiðingin 2010 hjá Føroya Kærustovni
Umbróting og teknindi: C4 design it
Liðugtgerð: www.c4designit.com

# Føroya Kærustovnur

## Ársfrágreiðing 2010

Innihaldsyvirlit


1. Endamálið við frágreiðingini . . . . . 5
2. Uppgávan hjá Kærustovninum . . . . . 6
3. Starvsfólk . . . . . 7
4. Fíggjarviðurskifti . . . . . 7
5. Virksemið í 2010 . . . . . 8
5.1. Innkomin mál . . . . . 8
5.2. Avgreidd mál . . . . . 9
5.3. Nýtt virksemi í 2010 . . . . . 10
5.4. Viðgerðartíðin . . . . . 10
5.5. Viðmerkingar og niðurstøða um virksemið í 2010 . . . . . 11
6. Ársfrágreiðingar . . . . . 11
7. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum . . . . . 12
8. Skatta- og avgjaldskærunevndin . . . . . 26
9. Kærunevndin hjá Stuðulsstovninum . . . . . 34
10. Kærunevndin í lendismálum . . . . . 38
11. Vinnukærunevndin . . . . . 44
12. Psykiatriska sjúklingakærunevndin . . . . . 50
13. Skuldarumskipanarnevndin . . . . . 54



Føroya Kærustovnur | Undir Hornabakka | Postsmoga 45 | 110 Tórshavn
Telefon 32 05 85 | Telefax 32 05 90 | www.kaerustovnur.fo



# 1. Endamálið við frágreiðingini

Tá ársfrágreiðingarnar fyri 2009 vóru á skránni, varð á fyrsta sinni roynt at gera eina samlaða frágreiðing fyri alt økið, sum Kærustovnurin er skrivstova hjá. Frammanundan hesum vóru frágreiðingar gjørdar fyri virksemið hjá hvørjari nevnd sær, men ongin heildarmynd var av øllum virkseminum hjá Føroya Kærustovni.

Neyðugt er framvegis at hava frágreiðingar fyri hvørja nevnd sær, soleiðis at vísast kann á, hvat er farið fram á júst hesum økinum í farna ári. Men mett verður, at ein heildarfrágreiðing av virkseminum hjá stovninum gevur eina mynd av øllum virksemi okkara, og at hetta eisini kann geva eina betri fatan av einstøku økjunum.

Tað er jú so, at serliga stór arbeiðsbyrða á einum øki eitt ár kann hava ávirkan á hini økini, sum stovnurin er skrivstova hjá. Nevnast kann t.d., at serliga nógv ella tung mál á einum øki eitt ár kann tyngja onnur øki tað árið, kanska soleiðis, at miðal viðgerðartíðin á hesum øki gerst longri. Hetta kann vera trupult at skilja, um ein bert situr við tølunum fyri eina nevnd, og fleiri mál ikki eru á júst hesum økinum. Men her kann ein heildarmynd av virkseminum hjá stovninum vísa orsøkina.

Við at gera eina samlaða frágreiðing um alt virksemið og samstundis hava frágreiðing um hvørja nevnd sær, ber til hjá einum og hvørjum at kunna seg um alt virksemið hjá stovninum ella bert at kunna seg við tað økið, sum viðkomandi er áhugaður í.

## 2. Uppgávan hjá Kærustovninum

Kjarnuuppgávan hjá Føroya Kærustovni er at vera skrivstova hjá kærunevndum, sum viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum.

Fyri tað fyrsta er tað fyrireikingin av málunum til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum, Kærunevndina í lendismálum, Vinnukærunevndina og Psykiatrisku sjúklingakærunevndina.

Kærustovnurin tekur sær av skrivstovuvirkseminum hjá nevndunum. Stovnurin móttekur kærurnar, skrásetir tær, sendir tær til ummælis og hoyringar hjá avvarðandi myndugleikum og møguligum triðu pørtum. Tá málið er fult upplýst, verður løgfrøðiligt upprit við tilmæli til niðurstøðu gjørt, og verður hetta saman við skjalatilfarinum í málinum sent limunum. Innkallað verður til fundar, og tá kærunevndin hevur tikið avgerð, avgreiðir Kærustovnurin avgerðina til kærara og avvarðandi myndugleika.

Avgerðirnar hjá kærunevndunum verða síðani gjørdar navnleysar og lagdar út á avgerðarsavn á heimasíðu okkara. Eisini tekur stovnurin sær av samsýningini hjá nevndunum og av goymsluni av málunum hjá nevndunum.

Eisini upplýsir og fyrireikar Kærustovnurin mál um skuldarumskipan til Skuldarumskipanarnevndina at taka støðu í. Hendan nevnd er ikki ein kærunevnd, men tekur nevndin beinleiðis støðu til umsóknirnar.

Arbeiðið fyri Fjølmiðlanevndina er avmarkað til skrivstovuvirksemið hjá nevndini tvs. skráseting av kærum, innheintan av upplýsingum, innkalling til fundar o.s.fr., men umfatar t.d. ikki løgfrøðiligt upprit. Talan er í hesum føri heldur ikki um avgerðir hjá myndugleikum, men um fjølmiðlasið.



## 3. Starvsfólk

Starvsfólkatalið hevur verið nakað tað sama seinastu 5 árini. Men í 2010 er starvsfólkatalið økt soleiðis, at vit nú hava 8 fulltíðarstørv. Starvssamansetingin fevnir nú um stjóra, 3,3 løgfrøðingar, deildarleiðara, 1,75 skrivstovufólk og ein skrivstovunæming.

## 4. Fíggjarviðurskifti

Játtanin til stovnin í 2010 var kr. 5.220.000. Afturat hesum hevur stovnurin fingið kr. 75.000 frá Innlendismálaráðnum til samsýning og skrivstovuarbeiði í samband við Fjølmiðlanevndina. Harumframt er rindað kr. 8.000 í gjaldi fyri kæruviðgerð í samband við Vinnukærunevndina í 2010. Nevndirnar verða samsýntar av játtanini hjá Kærustovninum.

# 5. Virksemið í 2010

## 5.1. Innkomin mál

Í 2010 móttók Kærustovnurin 377 nýggjar kærur. Hetta eru 67 færri enn í 2009, tá 444 kærur komu inn, men nakað sama tal sum í 2008, tá 380 kærur komu inn.




Aftur í 2010 er innkomna talið av kærum sera høgt. Nevnast kann, at miðaltalið av innkomnum kærum hesi trý seinastu árini er 400 kærur. Til samanberingar kann nevnast, at miðaltalið av innkomnum kærum tey trý árini undan hesum (tvs. frá 2005 til 2007) var 266.

Vert er at leggja til merkis, at í 2009 og 2008 vóru stórur partur av kærununum um mvg av skrásetingargjaldi. Hesar kærur eru ikki longur millum innkomnu kærurnar, og sæst hetta aftur í kærutalinum til Skatta- og avgjaldskærunevndina, sum í 2010 er komið niður á 65 kærur. Viðmerkjast skal tó, at hóast kærutalið til Skatta- og avgjaldskærunevndina í 2010 er minkað í mun til árini 2008 og 2009, er innkomna talið av kærum hetta árið væl hægri enn miðal innkomna talið av kærum árini frá 2005 til 2007, sum var 40 kærur.

204 kærur komu inn til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum í 2010. Hetta er mesta talið av kærum til hesa nevnd, síðani Kærustovnurin gjørdist skrivstova hjá nevndini. Kærurnar eru 20 fleiri enn í 2009, tá kærutalið var 184 og 71 fleiri enn í 2008, tá 133 kærur komu inn.

Á hinum økjunum er talið av kærum ikki broytt stórvegis. Ávís sveiggj eru altíð frá ári til ár, men talan er ikki um munandi broytingar í kærutalinum hjá hinum nevndunum.

## 5.2. Avgreidd mál

Avgreidd eru 496 mál í 2010. Hetta er nakað tað sama sum í 2009, tá 489 mál vórðu avgreidd. Talið av avgreiddum kærum er tó nógv hægri enn í 2008, tá 263 mál vórðu avgreidd og eisini nógv hægri enn árini 2004 til 2008, tá í miðal 230 kærur vórðu avgreiddar árliga.

Í 2010 eru flest avgreidd mál hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum. Soleiðis hevur tað verið næstan á hvørjum ári, undantikið í 2009, tá flest mál vórðu avgreidd av Skatta- og avgjaldskærunevndini.




Fremsta orsøkin til, at stovnurin aftur í ár hevur megnað at avgreiða so nógv mál er, at vit aftur í ár hava havt sum aðalmál, at borgarin skal fáa eina avgerð so skjótt sum gjørligt og hava tí raðfest arbeiði okkara við hesum í huga.

Hetta merkir tó, at aðrar uppgávur hava verið niðurraðfestar. Uppgávur sum eisini eru neyðugar, men sum ikki merkjast beinanvegin uttan fyri stovnin. Nevnast kann avgerðarsavn okkara, sum vit ikki hava megnað at hildið ajour. Vegleiðingar av ymiskum slagi, sum ikki eru gjørdar, og eisini hevur alt ov lítil tíð verið til skeið ella eftirútbúgvingar í 2010.

Eitt, sum uttan iva hevur havt ávirkan á talið av avgreiddum kærum, er, at lutfalsliga stórur partur av avgreiddu málunum hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum hetta árið eru burturfallin. Tá mál fellur burtur, áðrenn nevndin tekur støðu til málið, slepst undan tí partinum av arbeiði okkara, sum fevnir um løgfrøðiliga at fyrireika málið til nevndina. Skuldu øll hesi mál gjøgnum alla vanligu fyrireikingina, hevði tað als ikki borið til at avgreitt øll hesi mál.

Onnur orsøk til, at tað hevur borið til hjá stovninum at avgreiða so nógv mál í 2010 er, at stovnurin hetta árið hevur havt møguleika at økt um starvsfólkatalið við ½ løgfrøðingi og ½ skrivstovufólki. Hetta hevur givið nakað av rúmd.

## 5.3. Nýtt virksemi í 2010

Lóg um almenna Heilsutrygd varð sett í gildi 1. januar 2010, og kunnu avgerðir hjá Heilsutrygd kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Bert heilt fáa kærur eru innkomnar á hesum øki í 2010, men hvør orsøkin til hetta er, ber illa til hjá Kærustovninum at meta um.

## 5.4. Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin er ymisk frá nevnd til nevnd og liggur í 2010 frá 3½ mánaða fyri Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum til 8 mánaðir fyri Skuldarumskipanarnevndina.
Kærustovnurin strembar altíð eftir at stytta um viðgerðartíðina á øllum økjum. Men tað er greitt, at ein miðal viðgerðartíð fyri eitt øki kann vera longri enn fyri annað øki og tó vera nøktandi, tí tað er ymiskt, hvussu langa tíð tað tekur at upplýsa, viðgera og fyrireika málini innan ymsu økini. Ein miðal viðgerðartíð fyri mál hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini á 6 mánaðir verður mett at vera nøktandi, meðan ein nøktandi viðgerðartíð fyri Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum verður mett at vera einar 3 til 3½ mánaða.

Tað hevur í 2010 eydnast at stytta miðal viðgerðartíðina í mun til viðgerðartíðina fyri 2009 nakað fyri Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum og Kærunevndina í lendismálum, meðan miðal viðgerðartíðin er longd fyri Skatta- og avgjaldskærunevndina, Skuldarumskipanarnevndina og Vinnukærunevndina.

Sum heild kann sigast, at miðal viðgerðartíðin er ikki á nøktandi støði innan øll øki.



### 5.5. Viðmerkingar og niðurstøða um virksemið í 2010

Hetta er triðja árið á rað við sera stórum tali av innkomnum málum. Í miðal hevur talið av innkomnum kærum hesi trý seinastu árini verið 400 kærur árliga. Til samanberingar kann nevnast, at miðaltalið av innkomnum kærum trý árini undan hesum árunum, tvs. árini frá 2005 til 2007, var 266 kærur árliga. Talið av innkomnum kærum er sostatt hækkað við uml. 140 kærum árliga svarandi til eina hækking í kærum á uml. 50%.

Samstundis er týdningarmikið at leggja sær í geyma, at virkisøkið hjá stovninum í sama tíðarskeiði eisini er munandi víðkað. Talan er ikki bara um, at kærutalið innan gomlu økini er hækkað, og at vit harvið bara hava fleiri kærur innan sama lógarøkið. Tvørturímóti er lógarøkið, sum stovnurin nú skal hava innlit í, breiðkað sera nógv hesi seinastu trý árini.

Starvsfólkatalið hevur hinvegin verið stórt sæð tað sama seinastu fimm árini, tó at starvsfólkatalið í 2010 er økt við ½ løgfrøðingi og ½ skrivstovufólki. Men tað er greitt, at starvsfólkaorkan er als ikki á einum støði, sum svarar til hvørki hækkingina í málum ella víðkan av økinum.

Hóast hesar fyritreytir hava vit megnað at avgreitt eitt sera høgt tal av málum í 2010. Hetta hevur bert borið til, tí vit hava raðfest fremst, at borgarin skal hava sína avgerð so skjótt sum gjørligt og hava í hesi raðfesting sett aðrar uppgávur afturum. Uppgávur, sum eisini eru neyðugar, men sum ikki merkjast so væl uttanfyri stovnin.

Tað er tó greitt, at tað ber ikki til at niðurraðfesta týdningarmiklar uppgávur yvir eitt longri tíðarskeið, og í 2011 er neyðugt at seta meira tíð av til at fáa nakrar av hesum uppgávum frá hondini. Eisini er neyðugt at seta tíð av til t.d. eftirútbúgving og skeið, so vit kunnu fylgja við á ymsu lógarøkjunum og eisini betra um okkara førleikar, so vit fáa røkt okkara uppgávu til lítar.

## 6. Ársfrágreiðingar

Hjálagdar eru frágreiðingarnar um virksemið í 2010 hjá nevndunum, sum Kærustovnurin er skrivstova hjá. Fjølmiðlanevndin er tó undantikin, tí á hesum øki er tað ikki Kærustovnurin, men nevndin sjálv, sum ger frágreiðing um virksemið.

Anja Hovgaard
stjóri

# 7. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum

## Nevndin

Í Kærunevndini í almanna- og heilsumálum sita:

- Sigmund Poulsen, løgfrøðingur og formaður
- Annika Olsen, lækni,
- Karin Kjølbro, sosialráðgevi

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum viðger kærur um:

- Avgerðir hjá Almannastovuni
- Avgerðir hjá Nærverkinum, eftir forsorgarlógini (Heimarøktin, Serforsorgin og Stuðulsfólkaskipanin fyri børn)
- Avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi
- Avgerðir hjá kommunustýrum um barna- og ungdómstannrøkt
- Avgerðir eftir barnaverndarlógini, sum ikki kunnu kærast til høvuðsbarnaverndarnevndina
- Avgerðir eftir lóg um eldrarøkt á Sandoynni
- Avgerðir eftir lóg um Heilsutrygd

## Móttikin mál

Í 2010 komu 204 nýggjar kærur til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Hetta er tað størsta talið av kærum, sum Kærunevndin í almanna- og heilsumálum hevur móttikið, síðani Kærustovnurin gjørdist skrivstova hjá nevndini. Kærutalið er eisini væl meira enn bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 184 og 133 kærur vórðu móttiknar.



Flestu innkomnu kærurnar eru um avgerðir eftir forsorgarlógini. Tað er onki óvanligt í tí, forsorgarlógin fevnir eisini um eitt ógvuliga breitt øki, so sum uppihaldshjálp, endurbúgving og hjálparráð.

Næstflestar í tali eru kærur um tillutan og hækkan av fyritíðarpensjón. Hesum á baki koma kærur eftir sjúkrahúslógini, sum eru tvífaldaðar í mun til undanfarna ár, tá kærutalið annars eisini var økt nógv í mun til árið frammanundan.

Fyritíðar- og fólkapensjónsmál um ískoyti v.m. eru færri í tali hetta árið enn árið frammanundan. Nevnast kann annars, at bara 3 kærur um avgerðir eftir lóg um almenna heilsutrygd komu inn hetta fyrsta árið, eftir at henda lóg kom í gildi.

| | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| Forsorgarlógin | 50 | 80 | 74 |
| Fyritíðar- og fólkapensjónsmál (ískoyti, afturgjaldskrøv v.m.) | 22 | 35 | 24 |
| Fyritíðarpensjónsmál (tillutan, hækkan v.m.) | 29 | 30 | 36 |
| Barnaverndarlógin | 3 | 3 | 0 |
| Barnagjaldslógin | 2 | 3 | 6 |
| Dagpeningalógin | 20 | 12 | 12 |
| Nærverkið | 1 | 2 | 6 |
| Sjúkrahúsverkið | 3 | 16 | 32 |
| Heilsutrygd | 0 | 0 | 3 |
| Dagstovnalógin | 0 | 0 | 7 |
| Lóg um barnatannrøkt | 0 | 0 | 1 |
| Innlit | 3 | 3 | 1 |
| Stuðul til uppihaldspening | 0 | 0 | 2 |
| Í alt | 133 | 184 | 204 |

## Avgreidd mál

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum hevði 13 fundir í 2010 og avgreiddi 246 mál. Hetta er tað størsta talið av kærum, sum nevndin hevur megnað at avgreitt og 93 fleiri enn í 2009 og 122 fleiri enn í 2008.




Tey flestu avgreiddu málini eru eftir forsorgarlógini. Næst í tali eru mál um hækkan og tillutan av fyritíðarpensjón og harnæst koma ávikavist mál eftir sjúkrahúslógini og fyritíðar- og fólkapensjónsmál um ískoyti v.m.

| | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| Forsorgarlógin | 46 | 65 | 105 |
| Fyritíðar- og fólkapensjónsmál (ískoyti, afturgjaldskrøv v.m.) | 15 | 31 | 26 |
| Fyritíðarpensjónsmál (tillutan, hækkan) | 31 | 30 | 45 |
| Barnaverndarlógin | 6 | 2 | 0 |
| Barnagjaldslógin | 1 | 3 | 6 |
| Dagpeningalógin | 17 | 12 | 15 |
| Nærverkið | 0 | 4 | 10 |
| Sjúkrahúsverkið | 7 | 5 | 29 |
| Heilsutrygd | 0 | 0 | 2 |
| Dagstovnalógin | 0 | 0 | 6 |
| Lóg um barnatannrøkt | 0 | 0 | 1 |
| Innlit | 1 | 1 | 1 |
| Í alt | 124 | 153 | 246 |

## Avgreiðslan

Av teimum 246 avgreiddu málunum, var býtið millum myndugleikarnar soleiðis, at Almannastovan átti 198 mál, Sjúkrahúsverkið 29 mál, Nærverkið 10 mál, kommunurnar 7 mál og Heilsutrygd 2 mál.



## Almannastovan

Tey 198 málini hjá Almannastovuni vóru avgreidd soleiðis:




| | 2008 | | 2009 | | 2010 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 63 | 66% | 89 | 65% | 94 | 54% |
| Broytt | 8 | 8% | 15 | 11% | 15 | 9% |
| Heimvíst | 6 | 6% | 5 | 4% | 17 | 10% |
| Burturfallin | 19 | 20% | 27 | 20% | 47 | 27% |
| Avvíst | 1 | | | | 1 | |
| Kærufreist | 12 | | 5 | | 23 | |
| Uppafturtøka | 2 | | | | 1 | |
| Í alt | 111 | | 141 | | 198 | |

N.b. Í uppgerðunum er í mun til % sæð burtur frá avvístum málum, málum um kærufreist og málum um uppafturtøku.



Verður alt økið hjá Almannastovuni tikið undir einum sæst, at prosentparturin av avgerðum hjá Almannastovuni, sum vórðu staðfestar, er fallin munandi í 2010 í mun til árini frammanundan og er hetta árið 54%.

Men prosentparturin av avgerðum hjá Almannastovuni, sum eru broyttar, er eisini lækkaður í mun til undanfarna árið og er í 2010 9%. Hinvegin er prosentparturin av heimvístum málum hækkaður í mun til undanfarna árið og er 10% í 2010. Eisini prosentparturin av málum, sum fullu burtur, áðrenn Kærunevndin hevði tikið støðu til kæruna, er hækkaður í 2010 í mun til undanfarna árið og var hetta árið 27%.

Kærur, sum falla burtur, eru í høvuðsheitunum kærur, sum verða tiknar aftur, tí Almannastovan í samband við kæruviðgerðina hevur endurskoðað málið og er komin til annað úrslit t.v.s. broytt ta upprunaligu avgerðina, sum varð kærd. Kærustovnurin sær tað sum eina positiva gongd, at Almannastovan leggur seg eftir sjálv at endurskoða sínar avgerðir, tá tær eru kærdar, m.a. tí Almannastovan á hendan hátt eisini skjótari tillagar avgerðir sínar í mun til nýggjar avgerðir frá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum.

Verða burturfalnu málini eisini roknað við í positiva partin hjá Almannastovuni, so verður hesin parturin 81%. Til samanberingar kann nevnast, at hetta talið í 2009 var 85% og í 2008 86%.

Tó skal viðmerkjast, at tað er kanska ikki so positivt, at tað er talið av burturfalnum kærum, sum er hækkað, meðan talið av staðfestum kærum er lækkað, tí tá talan er um staðfestar kærur merkir tað, at borgarin beinanvegin fekk røttu avgerðina frá Almannastovuni.

Avgerðirnar, sum verða broyttar ella heimvístar, mynda tey mál, sum ikki eru nøktandi viðgjørd. Hetta er fyri alt økið undir einum tilsamans 19% av málunum í 2010. Til samanberingar kann sigast, at í 2009 og 2008 vórðu ávikavist 15% og 14% av kærumálunum hjá Almannastovuni broytt ella heimvíst.

Hyggja vit nærri at einstøku økjunum hjá Almannastovuni sæst, at tað er eitt fall í prosentpartinum av málum, sum eru staðfest, á øllum økjum í 2010 í mun til 2009. Samstundis er ein hækkan á øllum økjum, dagpeningamálini undantikin, í partinum av málum, sum falla burtur í mun til 2009.

## Forsorgarmál

| | 2008 | | 2009 | | 2010 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 25 | 61% | 46 | 74% | 57 | 66% |
| Broytt | 4 | 10% | 3 | 5% | 2 | 2% |
| Heimvíst | 3 | 7% | 3 | 5% | 10 | 12% |
| Burturfallin | 9 | 22% | 10 | 16% | 17 | 20% |
| Avvíst | | | | | 1 | |
| Kærufreist | 4 | | 3 | | 18 | |
| Uppafturtøka | 1 | | | | | |
| Í alt | 46 | | 65 | | 105 | |

Prosentparturin av forsorgarmálum, sum eru staðfest, er fallin í mun til 2009, men er hægri enn í 2008. Staðfest og burturfallin tilsamans er eisini lægri enn í 2009, men hægri enn í 2008.

Forsorgarlógin fevnir um eitt ógvuliga breitt øki, og hetta vísa avgreiddu málini eisini. Tað er ikki nakað ávíst øki innan forsorgarlógina, har tað eru serliga nógv mál hetta árið, men snúgva málini seg um bæði uppihaldshjálp, stakútreiðslur, hjálparráð, endurbúgving, endurgjald fyri inntøkumiss og bústaðarbroytingar. Sostatt er ikki nakað serligt at viðmerkja fyri hesi málini í 2010.

## Fyritíðar- og fólkapensjón (ískoyti, afturgjaldskrøv v.m.)

| | 2008 | | 2009 | | 2010 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 10 | 76% | 17 | 56% | 14 | 54% |
| Broytt | 1 | 8% | 5 | 17% | 2 | 8% |
| Heimvíst | 1 | 8% | | | 1 | 4% |
| Burturfallin | 1 | 8% | 8 | 27% | 9 | 34% |
| Kærufreist | 2 | | 1 | | | |
| Í alt | 15 | | 31 | | 26 | |

Prosentparturin av hesum málum, sum er staðfestur, er á leið tann sami sum í 2009, men væl minni enn í 2008. Hinvegin er prosentparturin, sum er burturfallin, vaksin nógv, og samanlagt er prosentparturin av málum, sum eru staðfest ella burturfallin størri í 2010 enn í 2008.

Flestu av hesum málunum snúgva seg um persónligt ískoyti, og verða hesi í mestan mun staðfest. Høvuðsorsøkin til hetta er ivaleyst, at treytirnar fyri at fáa ískoytið eru neyvt ásettar í kunngerð.

Sum nakað serligt fyri hetta árið kann annars nevnast, at fleiri av avgreiddu málunum hava snúð seg um brotpensjón, t.v.s. pensjón úr Føroyum til persónar, sum eru búsitandi í øðrum landi. Ofta er tað uppgerðin av bústaðartíðini, sum ósemja er um. Hesi mál verða ofta loyst, tá kærarin í kæru sínari greiðir nærri frá, hvar hann hevur búð. Almannastovan fær tá kanska upplýsingar, sum hon ikki hevði frammanundan og hyggur tí aftur at málinum.

## Fyritíðarpensjón (tillutan, hækkan v.m.)

| | 2008 | | 2009 | | 2010 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 16 | 59% | 18 | 62% | 14 | 34% |
| Broytt | 3 | 11% | 4 | 14% | 6 | 15% |
| Heimvíst | 1 | 4% | 2 | 7% | 6 | 15% |
| Burturfallin | 7 | 26% | 5 | 17% | 15 | 36% |
| Kærufreist | 3 | | 1 | | 3 | |
| Uppafturtøka | 1 | | | | 1 | |
| Í alt | 31 | | 30 | | 45 | |

Innan hetta økið má sigast at vera hend ein stór broyting í mun til árið frammanundan. Bert 34% av avgerðunum eru staðfestar í 2010. Hetta má sigast at vera eitt heldur lágt staðfestingarprosent. Árini frammundan var staðfestingarprosentið ávikavist 62% í 2009 og 59% í 2008. Hinvegin eru 36% burturfalnar í 2010, meðan 17% fullu burtur í 2009 og 26% í 2008. Prosentparturin av avgerðunum, sum eru broyttar ella heimvístar er 30% í 2010, meðan hetta var 21% í 2009 og 15% í 2008.

Hetta árið vóru, umframt málini um tillutan og hækking av fyritíðarpensjón, fleiri mál, har fyritíðarpensjón var tikin aftur, tí mett varð, at lønarinntøkan hjá viðkomandi var ov høg og ikki sambærlig við fyritíðarpensjón. Kærunevndin staðfesti 1 og heimvísti 5 av hesum málum til nýggja viðgerð vísandi til, at ymisk viðurskifti, sum eisini eru nevnd í innanhýsis leiðbeining hjá Almannastovuni, áttu at eftirkannast, áðrenn avgerð varð tikin um afturtøku av pensjón. Hetta fyri at fáa eina konkreta meting av inntøkuviðurskiftunum hjá viðkomandi kærara. Tvey av heimvístu málunum vórðu aftur kærd, eftir at Almannastovan hevði tikið nýggja avgerð, har hildið varð fast í afturtøkuni av fyritíðarpensjónini, og varð annað av hesum staðfest og hitt broytt.

## Dagpeningur

| | 2008 | | 2009 | | 2010 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 10 | 77% | 7 | 58% | 8 | 53% |
| Broytt | | | 2 | 17% | 2 | 13% |
| Heimvíst | 1 | 8% | | | 4 | 27% |
| Burturfallin | 2 | 15% | 3 | 25% | 1 | 7% |
| Avvíst | 1 | | | | | |
| Kærufreist | 3 | | | | | |
| Uppafturtøka | | | | | | |
| Í alt | 17 | | 12 | | 15 | |

Prosentparturin av viðgjørdu málunum í 2010, sum vórðu staðfest, er lækkaður nakað í mun til 2009 og heilt nógv í mun til 2008. Prosentparturin av málum, sum eru broytt ella heimvíst, er tilsamans 40% í 2010. Hetta er ein munandi hækking frá árunum frammanundan. Dagpeningamálini eru tó so fá í tali, so fyrivarni má takast fyri, at heilt fáar avgerðir hava lutvíst stóra ávirkan á prosentbýtið.

Innihaldsliga er ikki nakað serstakt at viðmerkja um dagpeningamálini í 2010.

## Barnagjaldslógin

| | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 1 | 1 | 1 |
| Broytt | | 1 | 2 |
| Burturfallin | | 1 | 1 |
| Kærufreist | | | 2 |
| Í alt | 1 | 3 | 6 |

Her verður prosentparturin ikki roknaður út, tí mett verður, at talan er um alt ov fáar avgerðir til, at tað gevur nakra meining at tosa um prosent.

## Sjúkrahúsverkið

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum avgreiddi 29 mál eftir sjúkrahúslógini í 2010. Av hesum vóru 26 kærumál um ávísing av fylgjara.




Kærumál innan hetta økið byrjaðu at koma inn í 2009 í sambandi við, at praksis hjá Landssjúkrahúsinum varð strammað upp á økinum. Í 2009 vórðu 5 kærumál innan hetta økið avgreiddar, og av hesum vóru 3 um ávísing av fylgjara.

Av teimum 29 avgreiddu málunum eru 10 staðfest, 2 broytt, 5 heimvíst, 11 burturfallin og 1 avvíst.

Viðmerkjast kann, at lutfalsliga fá mál eru staðfest í mun til kærumál innan onnur økir, og lutfalsliga nógv mál eru eisini heimvíst. Orsøkin til nógvu heimvísingarnar er, at málini eru ov illa lýst, og gjørligt er tí ikki hjá Kærunevndini at eftirkanna, um avgerðirnar eru í tráð við lógargrundarlagið.

Viðmerkjast kann eisini, at avgerðirnar eru sum heild illa upplýstar, og eingin ella ikki nøktandi grundgeving er fyri avgerðunum.

Vart skal gerast við, at sera nógv mál eru burturfallin í 2010. Í øllum málum er orsøkin til burturfallið, at Landssjúkrahúsið hevur tikið nýggja avgerð í málinum frá at nokta fylgjara til at játta fylgjara. Hetta er ógvuliga óvanligt, og spurnartekin kann setast við orsøkina til, at so nógvar avgerðir eftirfylgjandi verða broyttar. Um orsøkin er, at málini frá byrjan ikki hava fingið nøktandi málsviðgerð, er hetta sera óheppið.

Vart skal eisini gerast við, at tað í 2010 hevur verið ógvuliga torført at fáa neyðugu upplýsingar frá Landssjúkrahúsinum til viðgerð av kærumálum um ávísing av fylgjara. Neyðugt er í flestu málum at rykkja Landssjúkrahúsið eftir ummæli 3. ferðir, og tað er ikki í øllum førum, at hetta er nóg mikið. Hetta er als ikki nøktandi.

At enda skal vísast til viðmerkingar Kærustovnsins í ársfrágreiðingini fyri 2009 um leiðreglurnar. 26 kærumál um ávísing av fylgjara eru avgreidd í 2010, og hildið verður fast við, at leiðreglurnar ikki eru greiðar, og at tað er sera torført at fastleggja nýtsluøkið hjá hesum leiðreglum.

## Nærverk

| | 2009 | 2010 |
|---|---|---|
| Staðfest | 2 | 8 |
| Burturfallin | 2 | |
| Kærufreist | | 2 |
| Í alt | 4 | 10 |

Kærunevndin tók hetta árið støðu í 10 málum um avgerðir hjá Nærverk. Í 2009 vóru 4 mál og í 2008 var onki. 5 av avgreiddu málunum hjá Nærverk í 2010 vóru um avgerðir hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri børn (SFB). Hinar vóru um stuðul til umsorganararbeiði og búpláss á sambýli.

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn lá fyrr hjá Almannastovuni, men varð síðani flutt til Nærverk. Í 2010 hevur Kærunevndin soleiðis viðgjørt tilsamans 8 avgerðir hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri børn, men eru 3 av hesum avgerðum partur av tølunum hjá Almannastovuni.

Sambært § 32c í forsorgarlógini verður Stuðulsfólkaskipanin fyri børn stovnsett til børn undir 18 ár, sum tørva stuðulsfólk vegna virkistarn, orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndari sjúku. Landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta nærri reglur um, hvørji stuðulstiltøk eru fevnd av skipanini, hvussu skipanin skal virka, og hvør kann nýta skipanina. Landsstýrismaðurin hevur ikki brúkt heimildina at gera kunngerð eftir § 32c í forsorgarlógini.

Í 6 av hesum 8 avgerðum var grundgevingin fyri at nokta stuðul grundað á fíggjarligar trupulleikar hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri børn. Stuðulsfólkaskipanin metti, at tiltakið var fevnt av reglunum, men orsakað av fíggjarligum trupulleikum hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri børn var ikki gjørligt at seta tað í verk.

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn greiddi frá, hvørji stuðulstilboð, hon veitir, um upptøkufund, bíðilista o.s.fr. Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er serkunnleikin á økinum, og tá ongar reglur eru ásettar um, hvussu skipanin skal virka o.s.fr., bar ikki til at siga, at teirra prioritering ikki er í tráð við lógina. Kærunevndin staðfesti avgerðirnar hjá SFB grundað við, at tá játtanin hjá Stuðulsfólkaskipanini er ein rakstrarjáttan, og nóg mikið av peningi ikki er til allar umsóknirnar, er tað í lagi at nokta stuðul vísandi til manglandi játtan.

## Kommunurnar

| | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 3 | | 3 |
| Broytt | | | 1 |
| Heimvíst | | 1 | 1 |
| Burturfallin | 2 | | 2 |
| Avvíst | 1 | 1 | |
| Í alt | 6 | 2 | 7 |

6 av málunum innan hetta økið í 2010 snúu seg um fíggjarligt frípláss, og 1 mál var um barnatannrøkt.

Avgerðirnar vístu, at tað var ymiskt frá kommunu til kommunu, hvat tíðarskeið varð brúkt sum samanberingartíðarskeið, tá støða skuldi takast til, um inntøkan var broytt munandi. Kærunevndin metti, at tað, sum er avgerandi í mun til møguliga játtan av fíggjarligum fríplássi, er, um inntøkan, sum viðkomandi hevur og væntandi fer at hava í tíðarskeiðnum frá 1. august til 31. juli, er broytt munandi samanborið við inntøkuna í undanfarna kalendaraári. Tað er ikki ein meting av inntøkuni fyri inniverandi kalendaraár, sum skal samanberast við undanfarna kalendaraár.

Harafturat var ymiskt, hvussu barnaískoyti varð viðgjørt. Í rundskrivi nr. 4 frá 2009 frá Almannamálaráðnum, sum er vegleiðing til kunngerð um fíggjarligt frípláss, verður sagt, at serligt barnaískoyti sambært lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar, skulu ikki skiljast sum inntøkur, og skulu tískil ikki takast við í inntøkugrundarlagið.

## Heilsutrygd

Lóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd varð sett í gildi 1. januar 2010. Við hesum varð gjørligt at kæra avgerðir hjá Heilsutrygd til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.

Í 2010 eru einans 3 kærur innkomnar. Tvær av kærunum eru avgreiddar. Onnur snúi seg um rindan av heilsutrygdargjaldi, tá viðkomandi fjakkaðaði uttanlands, og hin snúði seg um stuðul til egingjald av styðjusokkabuksum. Báðar vórðu staðfestar.

## Samskiftið við myndugleikarnar

Samskiftið við myndugleikarnar gongur sum heild væl. Tó vísir tað seg at vera ógvuliga torført at fáa neyðugu upplýsingarnar frá sjúkrahúsverkinum sum víst á omanfyri.

## Viðgerðartíðin

Í 2010 var miðal viðgerðartíðin hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum góðar 5 mánaðir. Hetta er umleið 3 vikur styttri enn miðal viðgerðartíðin í 2009, sum var knappar 6 mánaðar. Sostatt hevur tað eydnast at stytt nakað um miðal viðgerðartíðina fyri hesi mál í mun til árið frammanundan. Men sum myndin vísir, er miðal viðgerðartíðin 1½ mánaða longri enn í 2008, tá hon var uml. 3½ mánaða.

Viðgerðartíðin verður roknað frá tí, kæra er innkomin, til hon er avgreidd frá nevndini. Tað hevði verið ynskiligt at fingið miðal viðgerðartíðina niður á einar 4 mánaðir fyri hetta slag av málum, men roknast kann ikki við at stytta viðgerðartíðina nógv meiri enn tað.

## Niðurstøða

Samanumtikið kann sigast um virksemið hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum í 2010, at árið er merkt av, at so nógv mál sum ongantíð fyrr eru innkomin til nevndina. Øll hesi mongu innkomnu málini hava havt við sær, at neyðugt varð at umprioritera og seta meira inn á hesum økinum ásannandi, at almannamál eru mál, har fólk helst ikki skulu bíða ov leingi eftir eini avgerð. Tá tað gjørdist møguligt at økja um starvsfólkatalið, varð tí greitt, at tað var á hesum økinum, at nýggj orka skuldi setast inn. Hetta hevur tó ikki verið nógmikið, og tí hava allir løgfrøðingarnar tikið eitt eykað tak, fyri at fáa so nógv almannamál avgreidd, sum gjørligt. Og tað má sigast, at tað eydnaðist, tí nevndin hevur hetta árið avgreitt so nógv mál, sum ongantíð fyrr.

Nevnast skal tó, at eitt, sum spælir inn í avgreiddu tølunum, er, at heili 24% av málunum, sum nevndin hevur avgreitt í 2010, eru burturfallin. Eitt fyritíðarpensjónsmál tekur drúgva tíð at fyrireika, og tað sigur seg sjálvt, at tá málið fellur burtur, áðrenn nevndin tekur støðu til málið, slepst undan løgfrøðiliga at fyrireika málið til nevndina. Hetta ger okkara uppgávu mikið lættari. Skuldu øll hesi mál gjøgnum vanligu fyrireikingina, hevði tað als ikki borið til at avgreitt øll hesi mál.

# 8. Skatta- og avgjaldskærunevndin

## Nevndin

Í Skatta- og avgjaldskærunevndini sita:

- Turið D. Hentze, advokatur og formaður
- Rannvá Sólheim, løgfrøðingur
- Kaj Johannesen, cand. merc.
- Pauli Klakkstein, maskinmeistari
- Niclas Joensen, civiløkonomur HD

## Viðgerðarøkið

Skatta- og avgjaldskærunevndin viðger kærur um:

- Avgerðir hjá TAKS um skatt, toll og meirvirðisgjald
- Avgerðir hjá Akstovuni um avgjald við skráseting av motorakførum

## Móttikin mál

Í 2010 eru 65 kærur latnar Skatta- og avgjaldskærunevndini. Av hesum eru 36 kærur innan skattaøkið, og 29 kærur eru innan avgjaldsøkið.

Færri mál eru komin inn í 2010 í mun til tey tvey undanfarnu árini, har 161 kærur komu inn í 2009, og 160 kærur komu inn í 2008.

Orsøkin til fallið í talinum av kærum er eitt fall í kærum um afturrindan av mvg av skrásetingargjaldi. 2010 er sostatt eitt meira vanligt ár, sum ikki hevur verið merkt at serliga nógvum kærum innan ávís øki.

Um vit síggja burtur frá kærumálum viðvíkjandi afturrindan av mvg av skrásetingargjaldi, hevur talið av innkomnum kærum ligið javnt seinastu árini, sum er eitt sindur meira enn 40 innkomnar kærur. Í 2010 er tó talan um eina hækking í talinum av innkomnum kærum, har 65 kærur eru innkomnar.



## Avgreidd mál

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevði 11 fundir í 2010 og avgreiddi 137 mál. Talið av avgreiddum kærum í 2009 og 2008 var ávikavist 236 og 57 mál. Talið av avgreiddum málum í 2010 var soleiðis nakað væl lægri enn í 2009 og nakað væl hægri enn í 2008. Talið av avgreiddum málum í 2010 var eisini væl hægri enn í 2007, har 34 mál vórðu avgreidd.

Orsøkin til fallið í talinum í mun til 2009 er, at nógvar av kærunum um mvg av skrásetingargjaldi vóru avgreiddar í 2009, og nevndin hevur ikki fingið líka nógvar kærur um hetta evnið síðani.

Hóast eitt fall er í talinum av avgreiddum málum í 2010 í mun til í 2009, eru ógvuliga nógv mál avgreidd í 2010. Orsøkin til hetta er, at nógv mál eru innkomin í 2010, og serliga nógv mál eru eisini innkomin í 2009.




## Býtið av avgreiddum málum

54 avgreidd kærumál vóru innan skattaøkið. Serligt fyri hetta árið var, at 34 mál vóru um skatt av kapitalvinningi.

37 kærur vóru innan mvg-økið, og av hesum vóru bert 5 mál um afturrindan av mvg av skrásetingargjaldi, meðan 18 mál vóru um fyrning av afturgjaldskravi viðvíkjandi mvg av skrásetingargjaldi.

Talan var um eitt javnt býti av kærum millum skatta- og mvg-økið í 2010 í mun til árið frammanundan. Størsti parturin av málum um afturrindan av mvg av skrásetingargjaldi, sum kom inn í 2008 og 2009, varð avgreiddur í 2009. Hetta er orsøkin til, at lutfalsliga nógv mvg-mál vórðu avgreidd í 2009. 2010 hevur verið eitt meira vanligt ár í mun til býtið av málum, tó eru enn lutfalsliga nógv mvg-mál í mun til árini áðrenn 2008.

Vísast kann eisini á, at 12 mál hava verið um uppafturtøku í 2010. Uppafturtøka varð játtað í 11 málum grundað á ein formligan og materiellan feil í sambandi við viðgerðina av kærunum. Talan var um 11 eins mál, og somu feilir gjørdu seg galdandi í øllum málum.

Lutfalsliga stórur partur av málunum í 2009 vóru um kærufreist, og frávik varð loyvt í 9 av 19 málum Frávikið var í flestu førum grundað á, at kæruvegleiðingin hjá TAKS var mangulfull. Í 2010 hava einans 7 mál verið um kærufreist, og einki frávik er loyvt. Hetta er ein jalig broyting. Viðmerkjast kann tó, at TAKS í sínum kæruvegleiðingum enn í lutfalsligan stóran mun vísir til gomlu adressuna hjá Kærustovninum. Víst verður tó til røttu postboks, og kæruvegleiðingin er tí nóg fullfíggjað til, at kæran kemur á rætta stað.

Viðvíkjandi málum um skrásetingargjald av akførum kann viðmerkjast, at talvan vísir eitt fall í kærumálunum á hesum øki. Talan er tó um lutfalsliga fá mál, tvs. eitt fall frá 6 málum til 4 mál, og tí ber ikki til at siga, um nøkur orsøk er til hetta.



## Avgreiðslan

77 kærumál eru staðfest av nevndini. Flestu kærumál eru sostatt staðfest, og í hesum er eingin broyting.

Annars kann viðmerkjast, at fá mál eru, sum í síni heild vórðu heimvíst til nýggja viðgerð hjá tí myndugleika, sum hevur tikið avgerð. Talan er um 4 mál. Lutfalsliga stórur partur av hesum málum eru kærumál um avgerðir hjá TAKS, sum viðvíkja striking úr mvg-skránni. Málini eru sum útgangsstøði heimvíst, tí tey hava verið ov illa lýst, og gjørligt hevur tí ikki verið at tikið avgerð í hesum málum.

Lutfalsliga eru tó fleiri mál heimvíst í 2010 í mun til í 2009. Talan er tó um so fá mál, at tað ikki ber til at siga nakað um orsøkina til hetta.

12 mál eru avvíst í 2010, og hetta eru lutfalsliga nógv mál í mun til undanfarnu árini. Orsøkin til flestu avvísingar var, at Skatta- og avgjaldskærunevndin ikki hevði málføri at viðgera kæruna.



*TAKS*

93 kærur um avgerðir hjá TAKS. Í mun til avgreiðsluna hjá TAKS í 2010 er einki serligt av viðmerkja.




## *Kommunala Skattakærunevndin*

6 kærur vóru um avgerðir hjá Kommunalari Skattakærunevnd. Sæð í mun til samlaða talið av avgreiddum málum, var parturin av kærum um avgerðir hjá Kommunalari Skattakærunevnd ikki serliga høgt í 2010. Hetta er tó ikki ein broyting í mun til undanfarnu ár. Í 2009 vóru 4 kærur, og í 2008 vóru 9 kærur um avgerðir hjá Kommunalari Skattakærunevnd.

Lutfalsliga nógvar avgerðir hjá Kommunalari Skattakærunevnd eru broyttar í 2010. Talan er tó um so fá mál, at ikki ber til at siga nakað um orsøkina til hetta.



*Akstovan*

Fýra kærur vóru um avgerðir hjá Akstovuni, og allar vórðu staðfestar av nevndini. Einki serligt er at viðmerkja til avgreiðsluna hjá Akstovuni.

Talan er um eitt fall í kærum í mun til 2009 og 2008, har seks kærur vóru á hesum øki. Talið á kærum sum heild er tó ov lítið til at siga, um nøkur orsøk er til hetta.




## Samskiftið við myndugleikarnar

Samskiftið við myndugleikarnar hevur verið gott í 2010, og Kærustovnurin hevur ikki nakað at viðmerkja í hesum sambandi.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2010 var umleið 6,5 mánaðir og var soleiðis longd við einum hálvum mánaða í mun til 2009 og við 2,5 mánaða í mun til 2008, har miðal viðgerðartíðin var góðar 4 mánaðir. Viðmerkjast kann tó, at viðgerðartíð er á sama støði sum í 2007 og árini framandundan.

Nevnast kann eisini, at miðal viðgerðartíðin fyri kærur um skatt var knappar 8 mánaðir og fyri kærur um mvg góðar 6 mánaðir.

Miðal viðgerðartíðin fyri málini, har Akstovan var avgerðarmyndugleiki, var góðar 10 mánaðir.

Ein miðal viðgerðartíð á 6 mánaðar er hóskandi fyri tey mál, sum Skatta- og avgjaldskærunevndin avgreiðir. Tað framgongur av ársfrágreiðingini fyri 2009, at viðgerðartíðin væntandi fór at verða longd í 2010, og at hon møguliga fór at verða væl longur enn í 2009. Orsøkin til hetta var, at stovnurin hevði raðfest málini um mvg av skrásetingargjaldi høgt, og hetta hevði við sær, at onnur mál máttu bíða.

Tað kann nú staðfestast, at tað hóast alt hevur verið gjørligt at halda miðal viðgerðartíðina á uml. 6 mánaðum.



Viðmerkjast skal eisini, at bert 74 av teimum 137 avgreiddu málum vórðu avgreidd innan 6 mánaðar. Hetta merkir, at lutfalsliga nógv færri mál eru í 2010 avgreidd inna 6 mánaðar í mun til í 2009.

Tað sama ger seg galdandi í mun til mál við eini viðgerðartíð á 6-12 mánaðar, har bert 39 mál høvdu hesa viðgerðartíð í 2010.

23 mál høvdu eina viðgerðartíð longri enn 12-24 mánaðar. Hetta er ein øking av málum við hesari viðgerðartíð í mun til 2009.

1 mál hevði eina viðgerðartíð longri enn 24 mánaðar, men hetta var grundað á viðurskifti hjá kærara.



# 9. Kærunevndin hjá Stuðulsstovninum

## Nevndin

Í Kærunevndini hjá Stuðulsstovninum sita:

- Birta Biskopstø, løgfrøðingur og formaður
- Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur
- Bjørg Róin, lestrarvegleiðari

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin hjá Stuðulsstovninum viðger kærur um avgerðir hjá Stuðulsstovninum eftir løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul.

## Móttikin mál

Í 2010 komu 12 nýggjar kærur til Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum. Hetta eru nakrar færri enn í 2009, tá 16 kærur vórðu móttiknar, men er nakað tað sama sum í 2008, tá 11 kærur vórðu móttiknar.

5 av kærunum vóru um avgerðir eftir ÚSUN reglunum, 4 av kærunum vóru um lestrarstuðul í Føroyum, og 3 vóru um ferðastuðul til lesandi uttanlands.



## Avgreidd mál

Kærunevndin hevði 5 fundir í 2010 og avgreiddi 19 mál. Hetta eru 5 fleiri enn í 2009 og 12 fleiri enn í 2008.




Málini, sum fylla mest hetta árið, eru málini eftir reglunum um útbúgvingarstuðul uttan fyri norðurlond (ÚSUN). Heili 9 av málunum vóru um ÚSUN. Endamálið við ÚSUN reglunum er fremst av øllum at skapa fíggjarligt grundarlag undir hægri útbúgving uttan fyri Norðurlond.

Men við § 13, stk. 3 í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul gjørdist møguligt hjá Stuðulsstovninum í serstøkum førum at veita skúlagjald í Norðurlondum, og av teimum 9 málunum um ÚSUN snúu 5 seg um ÚSUN stuðul í Norðurlondum.

Innihaldið í málunum annars var eitt sindur av hvørjum. Nevndin tók soleiðis m.a. støðu til útbúgvingarstuðul í samband við phd-lesnaða, treytir fyri at fáa barnastudning og stuðul út yvir ásettu lestrartíð.

## Avgreiðslan




9 av kærdu málunum vórðu staðfest, 3 vórðu broytt, 1 partvíst broytt og 3 heimvíst. 1 fall burtur, tí Stuðulsstovnurin, eftir at málið varð kært, tók málið til nýggja viðgerð. 1 varð afturkallað, og í einum málið tók nevndin støðu til, um kæran skuldi takast til viðgerðar, hóast kærufreistin var farin.

## Viðgerðartíðin

Í 2010 var miðal viðgerðartíðin 3½ mánaða. Hetta er ein mánaða styttri enn miðal viðgerðartíðin í 2009, sum var 4½ mánaða. Sostatt hevur tað eydnast at stytt um viðgerðartíðina fyri hesi mál, og at fingið viðgerðartíðina niður á eitt rímiligari støði fyri hetta slagi av málum.

Miðal viðgerðartíðin hetta árið er tó hálvan mánaða longri, enn miðal viðgerðartíðin var í 2008.

## Samskiftið við Studna

Samskiftið við Studna hevur gingið væl, og Kærustovnurin hevur ikki nakað at viðmerkja í hesum sambandi.


Føroya Kunngerðasavn B 1 2002
Føroya Kunngerðasavn B 2 2002
Føroya Kunngerðasavn A
Føroya Kunngerðasavn B
Føroya Kunngerðasavn A
Føroya Kunngerðasavn B
Føroya Kunngerðasavn A
Føroya Kunngerðasavn B
Føroya Kunngerðasavn B
Føroya Kunngerðasavn A
Føroya Kunngerðasavn D
Føroya Kunngerðasavn A

# 10. Kærunevndin í lendismálum

## Nevndin

Kærunevndini í lendismálum sita:

- Marjun T. Magnussen, løgfrøðingur og formaður
- Jens Wang, løgfrøðingur
- Birgit Hansen, verkfrøðingur
- Óla Jákup Guttesen, byggimeistari
- Tórálvur Weihe, arkitektur

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin í lendismálum viðger kærur um:

- Avgerðir hjá kommununum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt
- Avgerðir hjá kommununum eftir 1881-lógini um ognartøku
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um matrikulering og sundurbýti
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um tinglýsing
- Avgerðir eftir lógini um eigaraíbúðir

## Móttikin mál

Í 2010 komu 32 nýggjar kærur til Kærunevndina í lendismálum. Hetta eru nakrar fleiri enn í 2009, tá 25 kærur vórðu móttiknar, men er nakað tað sama sum í 2008, tá 33 kærur vórðu móttiknar.

27 av kærunum vóru um byggimál eftir byggisamtykt, 3 av kærunum vóru um matrikulering og sundurbýti, og 2 vóru um tinglýsing. Eingin kæra kom inn um ognartøku.

Tað eru soleiðis framvegis mest kærur í byggimálum.



## Avgreidd mál

Kærunevndin í lendismálum hevði hetta árið 10 fundir og avgreiddi 34 mál. Í 2009 vóru 11 fundir og 32 avgreidd mál. Í 2008 vóru 34 mál avgreidd. Eftir evni býttu málini seg soleiðis:




Býtið millum tey ymisku evnini er eins og undanfarin ár.

## Avgreiðslan




Um hugt verður eftir øllum málunum, so eru færri staðfestingar í 2010 enn í 2009 og fleiri avvístar kærur í 2010 enn í 2009. Tó vóru nógv fleiri kærur, sum fullu burtur.

Um hugt verður eftir ymisku lógarøkjunum, sær býti soleiðis út.

## Kærur um byggimál – 26 í alt:




Talan er um avgerðir hjá fleiri kommunum, tí er trupult at gera viðmerkingar og samanberingar um gongdina. Tað eru tó fleiri staðfestingar í 2010, enn tað vóru í 2009 og eisini fleiri avvísingar í 2010 enn 2009.

## Kærur um matrikulmál – 4 í alt:



## Kærur um ognartøkumál – 1 í alt:




Kærunevndin hevur viðgjørt eitt mál um ognartøku í 2010. Tann kæran varð avvíst, tí talan var um broyting í býarskipan, og tí hevði Kærunevndin ikki heimild at viðgera kæruna.

## Kærur um tinglýsingarmál – 3 í alt:



## Viðgerðartíðin

Samlaða miðal viðgerðartíðin í 2010 var 6 mánaðir og 7 dagar.

Samlaða miðal viðgerðartíðin í 2009 var 7 mánaðir og 12 dagar. Samlaða miðal viðgerðartíðin var 5 mánaðir og 18 dagar í 2008. Viðgerðartíðin er sostatt stytt við uml. einum mánaða í 2010 í mun til 2009.

Tað vísir seg at taka langa tíð at lýsa hesi málini, og serliga eru tað byggimálini, sum taka langa tíð at fáa lýst. Ein orsøk er, at tað ofta eru fleiri partar í hesum málum, og ofta eru nógvar viðmerkingar frá bæði kærarum og myndugleikum. Eisini hava nøkur mál verið fyri nevnd einar 2 ferðir, áðrenn tey eru vorðin endaliga avgreidd.

Í 2009, tá miðal viðgerðartíðin var 7 mánaðir og 12 dagar, varð mett, at viðgerðartíðin kundi styttast eitt sindur, og í 2010 varð tí strembað eftir at stytta um viðgerðartíðina. Hetta hevur eydnast. Men mett verður, at viðgerðartíðin av hesum málum neyvan kemur niður um uml. 5 til 6 mánaðir.

## Samskiftið við myndugleikarnar

Samskiftið við Umhvørvisstovuna gongur væl, eins og samskiftið við kommunurnar sum heild gongur væl. Samskiftið við Tórshavnar kommunu gongur tó eitt sindur trekt, og tað tekur langa tíð at fáa upplýsingar, men tey eru blivin betur til at biðja um longda freist.

## Kærur til Løgtingsins Umboðsmann:

Tað komu tvær niðurstøður frá Løgtingsins Umboðsmanni í 2010 innanfyri økið hjá Kærunevndini í lendismálum.

Í tí eina málinum varð boðað frá, at Umboðsmaðurin gjørdi ikki meira við málið, tí klagarin boðaði frá, at hann tók kæru sína aftur, tí kommunan hevði tikið málið upp aftur til nýggja viðgerð.

Í hinum málinum varð tann 22. januar 2010 klagað til Umboðsmannin um, at kommunan tók aftur eitt byggiloyvi til neyst, og at Kærunevndin í lendismálum hevði staðfest avgerðina. Umboðsmaðurin var í niðurstøðu síni samdur við Kærunevndina í, at ein myndugleiki hevur skyldu til at afturkalla eitt loyvi, um tað vísir seg at vera í stríð við lógargrundarlagið.


KARNOV
KARNOV
KARNOV
KARNOV
KARNOV
SOCIAL
RETFÆRDIGHED

# 11. Vinnukærunevndin

## Nevndin

Vinnukærunevndin verður samansett av trimum ella fimm limum, tá hon skal taka støðu til einstøk kærumál. Formaðurin ella næstformaðurin og tveir ella fýra limir við serkunnleika á viðkomandi øki.

- Thomas Magnussen, løgfrøðingur er formaður
- Gurið Joensen, løgfrøðingur er næstformaður

Limirnir við serkunnleika eru:

- Ebba Mortensen, serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvislógini
- Róðin Mellemgaard, serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvislógini
- Jóngerð Biskupstø, serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvislógini
- John Mikkelsen, serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvislógini
- Jan Sørensen, serkønur limur viðvíkjandi alilógini
- Ari Johanneson, serkønur limur viðvíkjandi alilógini
- Laila Mortensen, serkønur limur viðvíkjandi lóg um tryggingarvirksemi
- Ole Haugaard Nielsen, serkønur limur viðvíkjandi lóg um tryggingarvirksemi
- Sigurð Ó. Vang, serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Hermann Oskarsson, serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Brynleif Poulsen, serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðaralógini
- Pauli Ellefsen, serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðaralógini
- Jákup Mørkøre, serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini, djórasjúkulógini og lóg um djóralæknavirksemi
- Ole Jürgens, serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini, djórasjúkulógini og lóg um djóralæknavirksemi
- Niels Terkelsen, serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini, djórasjúkulógini og lóg um djóralæknavirksemi
- Palli Mortensen, serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Jón Kragesteen, serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Boði Haraldson, serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Pætur Joensen, serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir

- Knud Erik Skovby, serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Sigurjón Ingvason, serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini og lóg um postvirksemi
- Rannvá Sólheim, serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Una Joensen, serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Bergur í Garði, serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Hjørdis Gaard, serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Marja Lamhauge, serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Petur í Króki, serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Sigurd Lamhauge, serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni

## Viðgerðarøkið

Vinnukærunevndin viðger kærur um:

- avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir
  - Partafelagslógini
  - Smápartafelagslógini
  - Ársroknskaparlógini
  - Lóg um ávís vinnurekandi virkir
  - Lóg um vinnurekandi grunnar
  - Lóg um vinnu og
  - Lóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
- avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lóg um arbeiðsumhvørvi
- avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti
- avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping
- avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um tryggingarvirksemi
- avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi
- avgerðir hjá Elveitingareftirlitinum eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- avgerðir hjá Landsverk eftir lóg um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál
- avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir lóg um matvørur v.m. og lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
- avgerðir hjá Akstovuni eftir lóg um ferðslu

## Móttikin mál

Í 2010 eru 21 kærur latnar Vinnukærunevndini. Hetta er stórt sæð tað sama sum árið frammanundan, tá 20 kærur vórðu móttiknar. Fyrsta árið hjá Vinnukærunevndini, í 2008, vórðu 15 kærur móttiknar.

Flestu móttiknu kærurnar hetta árið eru um avgerðir hjá Akstovuni. Hesar eru 9 í tali. Harnæst koma kærur um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum eru 5 í tali. Annars er ein kæra innkomin á hvørjum hesum økjum; Landsverk, Arbeiðseftirlitinum, Posteftirlitinum og Tryggingareftirlitinum.

Hetta árið komu eisini fyrstu kærurnar um avgerðir hjá Elveitingareftirlitinum, har 2 kærur eru móttiknar og 1 kæra eftir lóg um setanarprógv.



## Avgreidd mál

Tiknar vórðu 18 avgerðir í 2010. Hetta eru 2 færri enn í 2009 og 12 fleiri enn í 2008.




## Avgreiðslan

Vinnukærunevndin staðfesti 8 av avgerðunum, broytti 1 og broytti 1 partvíst, 2 fullu burtur, 2 vórðu heimvístar og 2 avvístar. Harumframt tók nevndin støðu til, um frávik skuldi loyvast frá kærufreist í 1 máli, og um kæra skuldi hava steðgandi virknað í 1 føri.



*Akstovan*

3 avgerðir vórðu staðfestar, 1 varð partvíst broytt, 1 broytt og 1 heimvíst

*Arbeiðseftirlitið*

1 avgerð varð heimvíst til nýggja viðgerð.

*Heilsufrøðiliga Starvsstovan*

3 avgerðir vórðu staðfestar. Harumframt varð í einum málum støða tikin til at geva kæru steðgandi virknað, og frávik varð loyvt frá kærufreist í einum máli.

*Landsverk*

Vinnukærunevndin avvísti 2 mál við teirri grundgeving, at privatrættarligar avtalur eru ikki fyrisitingarligar avgerðir og kunnu tí ikki kærast til Vinnukærunevndina. Ein kæra varð fall burtur.

*Posteftirlitið*

2 avgerðir vórðu staðfestar, og ein fall burtur, tí viðkomandi rindaði ikki gjald fyri kæruviðgerð.



## Gjald fyri kærur

Vísandi til § 7 í kunngerð nr. 78 frá 28. august 2008 um vinnukærunevnd er gjald ásett fyri viðgerð av ávísum kærum til Vinnukærunevndina. Kostnaðurin fyri kæruviðgerð er settur til kr. 4.000, uttan tá kæran viðvíkur viðurskifti, ið ikki hava samband við tað aktuella ella framtíðar vinnuvirksemið hjá viðkomandi, ið kærir. Í slíkum førum er kostnaðurin kr. 2.000.

Í 2010 er gjald á kr. 4.000 rindað 2 ferðir.

## Samskiftið við myndugleikarnar

Sum heild má samstarvið við myndugleikarnar sigast at hava gingið væl, og Kærustovnurin hevur fingið tey skjøl og frágreiðingar, sum biðið er um og innan rímiliga tíð.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin fyri øll avgreidd mál hjá Vinnukærunevndini í 2010 var 5½ mánaðir. Longsta viðgerðartíðin vardi góðar 11 mánaðir, og stytsta viðgerðartíðin var 12 dagar.
Hetta má metast at vera ein rímilig viðgerðartíð fyri hetta slagi av málum.

## Val av serkønum nevndarlimum

Eins og gjørt var í seinastu ársfrágreiðing, skal aftur í ár vart gerast við, at á flestu økjum eru enn bert tveir serkønir limir valdir til Vinnukærunevndina.

Lógin leggur upp til, at formaðurin tilnevnir 2 til 4 serkønar limir at viðgera málini. Men tá tað í flestu førum bert eru valdir tveir serkønir limir á hvørjum øki, er tilnevning formansins meira formlig enn reell. Mælt verður til, at í minsta lagi 4 serkønir limir verða valdir til økini, eisini við atliti til møguligar gegnistrupulleikar.

# 12. Psykiatriska sjúklingakærunevndin

## Nevndin

Limir í Psykiatrisku sjúklingakærunevndini eru
- Nella Festirstein, løgfrøðingur, formaður í nevndini
- Kaj Kallsberg, fyrrv. kommunulækni
- Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari

## Viðgerðarøkið

Kærast kann til psykiatrisku sjúklingakærunevndina, um persónur, í samband við innlegging á psykiatrisku deild, verður útsettur fyri tvingsli.

## Virksemið í 2010

Psykiatriska sjúklingakærunevndin fór at virka 1. okt. 2009, tá ið psykiatrilógin kom í gildi.

Hetta er onnur ársfrágreiðing frá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini. Ársfrágreiðingin fyri 2009 fevndi bert um 3 mánaðar, og grundarlag er ikki fyri einum samanburði, tí lóggávan hevur virkað ov stutt.

Kærunevndin hevur hildið 6 fundir í 2010, 5 kærur eru móttiknar, og 5 eru avgreiddar.

Kærurnar til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina innihalda ofta kærur um fleiri ymisk tvingsilsinntriv, og hevur Kærunevndin tí tikið støðu til fleiri tvingsilsinntriv enn talið av kærum.

## Kærumálini, sum vórðu avgjørd, vóru av hesum slagi:

| | |
|---|---|
| ▪ Tvingsilsinnlegging | 3 |
| ▪ Tvingsilsfastspenning | 3 |
| ▪ Tvingsilsafturhald | 3 |
| ▪ Bráðfeingis sissandi heilivág | 1 |
| Í alt | 10 |

Kærunevndin avgjørdi at góðkenna 2 tvingsilsinnleggingar, 3 tvingsilsfastspenningar, 2 tvingsilsafturhald og 1 bráðfeingis sissandi heilivág hjá Psykiatriska deplinum. Ein sjúklingur fekk partvíst viðhald í sínari kæru, tí Psykiatriska sjúklingakærunevndin metti, at 1 tvingsilsinnlegging varð framd av órøttum, og 1 tvingsilsafturhald varð framt av órøttum.

## Tvingsilsfyriskipanir á Psykiatriska deplinum í 2010

Psykiatriski depilin hevur upplýst fyri Føroya Kærustovni, at frá 1. januar til 31. desember 2010 hava 31 tvingsilfyriskipanir verið tilsamans.

| | |
|---|---|
| ▪ Tvingsilsinnlegging | 13 |
| ▪ Tvingsilsfastspenning | 6 |
| ▪ Tvingsilsafturhald | 8 |
| ▪ Tvingsilsviðgerð | 4 |
| Í alt | 31 |

Sjúklingaráðgevar hava verið tilnevndir 18 ferðir í 2010.

Um tølini frá Psykiatriska deplinum verða samanborin við talið á kærum sæst, at tað eru á leið ein triðingur av tvingsilsfyriskipanum, ið er kærdur í 2010.

Í viðmerkingunum til lógina verður sagt, at undir fyrrverandi lóggávu vóru ógvuliga fáar kærur, t.v.s. uml. 1-2 um árið, men sum ein avleiðing av øktum kærumøguleika og -leiðbeining fer hetta væntandi at økjast til í mesta lagi 10 um árið. Sum víst á frammanfyri eru 5 kærumál innkomin og avgreidd í 2010 og soleiðis sæst ein vøkstur av árligum kærumálum.

## Viðgerðartíðin

Sambært almennu viðmerkingunum í løgtingsmálinum um at seta í gildi psykiatrilógina er grundgevingin fyri at seta á stovn eina psykiatriska kærunevnd eitt ynski um at bøta um rættartrygdina hjá sjúklingunum við eini skjótari og smidligari viðgerð av kærumálum. Ásett er, at kærunevndin skal taka avgerð skjótast til ber. Ein avgerandi fortreyt fyri hesum er, at Psykiatriska sjúklingakærunevndin fær kæruna til viðgerðar.

Sambært lógarviðmerkingunum skal Landssjúkrahúsið eftir umbøn frá sjúklinginum ella sjúklingaráðgevanum leggja kærur um nýtslu av tvingsli fyri Psykiatrisku sjúklingakærunevndina. Tá ið eitt mál verður lagt fyri Psykiatrisku sjúklingakærunevndina, hevur Landssjúkrahúsið skyldu at senda øll skjøl, sum viðvíkja málinum. Harímillum skal ein útskrift úr tvingsilsgerðabókini, ein frágreiðing frá ábyrgdarhavandi yvirlæknanum umframt ein viðgerðarætlan latast Kærunevndini.

Miðal skjalaavgreiðslutíðin í 2010 hjá Landssjúkrahúsinum var 25 dagar og miðal kæruviðgerðartíðin hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini var 26 dagar. Longdin av kæruviðgerðartíðini er týðiliga ávirkað av (serliga) tveimum málum, har nevndin tók stig til at fáa fleiri upplýsingar til vega. Um bíðitíð eftir umbidnum upplýsingum verður drigin frá kæruviðgerðartíðini, kemur hon niður á uml. 9 dagar.

Sostatt stendst lutvíst stórur partur av kæruviðgerðartíðini av, at umbidnar upplýsingar hava verið leingi ávegis ella ikki eru latnar nevndini. Tað eina málið, sum týðiliga leingir um miðal kæruviðgerðartíðina hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini, viðvíkur uppgávunum hjá løgregluni, sum henni er áløgd við psykiatrilógini. Psykiatriska sjúklingakærunevndin bað um eina frágreiðing, sum ikki varð gjørd, og tí valdi nevndin at taka avgerð á fyriliggjandi upplýsingum.

Tá høvuðsendamálið við Psykiatrilógini er rættartrygdin hjá sjúklinginum, og tá Kærunevndin hevur eina lutfalsliga nágreiniliga ásetta avgerðartíð, er tað høpisleyst, at ein long avgreiðslutíð serliga hjá Landssjúkrahúsinum skal máa støðið undan eini skjótari viðgerðartíð sum heild. Viðmerkt verður, at sjúklingráðgevar hava víst á sína ónøgd við skjalaavgreiðsluna á Landssjúkrahúsinum í samband við nevndarfundir og hava eisini vent sær í hesum høpi til Føroya Kærustovn.

Í lógarviðmerkingunum verður sagt, at av tí at Psykiatriska sjúklingakærunevndin er nýggj í hesari lóg, fer hon at hava broytingar í arbeiðsgongdum við sær á psykiatrisku deild. Vísandi til gjøgnumgongdina omanfyri verður gjørt vart við, at neyðugt er at skipa avgreiðsluna á Landssjúkrahúsinum, soleiðis at viðgerðartíðin sum heild virkar sum ætlað.

## Samskiftið við Psykiatriska depilin

Annars verður framhaldandi latið væl at samskiftinum við Psykiatriska depilin. Uppmøtingarnar til fundirnar hjá Kærunevndini hava eisini framhaldandi verið góðar bæði frá starvsfólkunum á Psykiatrisku deild og frá sjúklingaráðgevunum.

## 13. Skuldarumskipanarnevndin

### Nevndin

Í Skuldarumskipanarnevndini sita:

- Ingi Højgaard, advokatur og formaður í nevndini
- Ulla Joensen, cand. merc.
- Súsanna Leo, løgfrøðingur

### Viðgerðarøkið

Nevndin viðger umsóknir um umskipan av almennari skuld.

### Móttikin mál

Í 2010 komu 35 mál inn. Hetta eru 5 fleiri enn í 2009 og 7 fleiri enn í 2008.

Á talvuni síggjast innkomnu málini uppbýtt eftir skuldarslagi. Tvær umsóknir komu inn í bólkinum vinnu- og veðhaldslán. Tað komu ongar umsóknir inn í bólkinum framleiðslugjald, tollur, AM-gjald og lønarhæddaravgjald.



## Avgreidd mál

Skuldarumskipanarnevndin hevði 5 fundir í 2010, og vóru 33 mál avgreidd.
Eftir evni býttu málini seg soleiðis:




Nevndin hevur viðgjørt fleiri mál um lestrarlán og skattaskuld í 2010 enn í 2009.

## Avgreiðslan



## Eftirgivin skuld:

Skuldarumskipanarnevndin eftirgav í alt umleið kr. 2.713.303,00 í 2010.

Skuldin er uppbýtt soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Rentuskuld | uml.kr. | 1.600.913,00 |
| Vinnu- og veðhaldslán | uml.kr. | 0,00 |
| Lestrarlán | uml.kr. | 156.690,00 |
| Mvg-skuld | uml.kr. | 333.096,00 |
| Landsskattur | uml.kr. | 622.604,00 |

Tað er torført at seta upp nágreinilig tøl um eftirgevingar, tí ymiskar umstøður gera, at tølini ofta broytast eitt sindur. Rentuskuldin broytist t.d. alla tíðina. Hini tølini kunnu vera broytt eitt sindur, frá tí at umsóknin kom inn, til avgerðin varð tikin av nevndini.

Í málunum, har nevndin hevur samtykt ikki at ganga umsóknini á møti, hevur talan í nógvum føri verið um mál, har skuldin er lítil sæð í mun til ogn og inntøku hjá persóninum, ella at umsøkjarin hevur havt frívirði í fastari ogn. Taks hevur eisini í nøkrum førum trygt veð fyri skuldina.

Viðmerkt verður, at í 2010 vórðu ongar avgerðir tiknar í bólkinum vinnu- og veðhaldslán, framleiðslugjald, tollur og lønarhæddaravgjald.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2010 var 8 mánaðir. Um trý sera drúgv mál, sum at enda fullu burtur, verða tikin frá, var miðalviðgerðartíðin í 2010 7 mánaðir. Viðmerkt verður, at í 2010 hevði Skuldarumskipanarnevndin bert 5 fundir, og hetta er ivaleyst við til at leingja um viðgerðartíðina hjá nevndini. Miðal viðgerðartíðin í 2009 var 6 mánaðir og 5 dagar. Sostatt er viðgerðartíðin longd næstan ein mánaða í 2010.

Ummælistíðin hjá TAKS var í miðal 22 dagar. Viðgerðartíðin hjá kommununum var í miðal 2 mánaðir og 20 dagar. Miðal viðgerðartíðin hjá Tórshavnar kommunu var 4 mánaðir og 5 dagar, meðan miðalviðgerðartíðin hjá hinum kommununum var 1 mánaði og 10 dagar. Stuðulsstovnurin hevði eina miðalviðgerðartíð uppá 9 dagar.

## Samskiftið við myndugleikarnar

Kærustovnurin hevur havt samskifti við TAKS, Stýrið í sambandi við upplýsingina av málunum, og við Stuðulsstovnin, tá talan er um lestrarlán. Mett verður, at hetta samskiftið hevur gingið væl. Upplýsingargongdin er komin í eina fasta legu.

Kommunurnar taka avgerð um kommunuskattaskuldina. Mett verður, at tað tekur ov langa tíð hjá Tórshavnar kommunu at taka avgerð um kommunuskattaskuldina. Ynskiligt hevði verið, at hesi málini vórðu avgreidd eitt sindur skjótari. Tað kundi stytt eitt sindur um samlaðu viðgerðartíðina.

## Viðmerkingar

Kærustovnurin fer enn einaferð at vísa á, at viðgerðarmannagongdin, sum er neyðug fyri at fylgja ásettu lógarkrøvunum fyri skuldarumskipan, er tung, og virkar nakað stirvin, tá talan er um minni skuld. Mett verður, at skipanin hevði verið meira fleksibul og lættari at umsitið, um t.d. TAKS hevði heimild at eftirgivið minni upphæddir, og at gjørt rentufríar gjaldsavtalur av skuld upp til t.d. kr. 50.000,00.

Ein persónur kærdi eina avgerð um eftirgeving til Løgtingsins Umboðsmann í 2008. Løgtingsins Umboðsmaður kom við eini niðurstøðu tann 22. apríl 2009. Umboðsmaðurin heitti á Skuldarumskipanarnevndina um at taka málið uppaftur av nýggjum. Skuldarumskipanarnevndin tók nýggja avgerð tann 8. mars 2010. Tann 19. mars 2010 heitti advokatur umsøkjarans á Umboðsmannin um at viðgera málið av nýggjum. Í hesum sambandi heitti Umboðsmaðurin á Skuldarumskipanarnevndina um at koma við nærri frágreiðing um nevnda mál. Tann 17. mai 2010 hevur Umboðsmaðurin boðað Skuldarumskipanarnevndini frá, at hann, grundað á frágreiðingina hjá nevndini, ikki ger meira við hetta mál.

www.kaerustovnur.fo

Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur undir Innlendismáláraðnum. Stovnurin fyrireikar kærumál til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum, Kærunevndina í Lendismálum, Vinnukærunevndina og Psykiatrisku Sjúklingakærunevndina. Harumframt er Kærustovnurin skrivstova hjá Skuldarumskipanarnevndini og Fjølmiðlanevndini. Á stovninum starvast í løtuni níggju fólk; stjórin, fýra løgfrøðingar og fýra skrivstovufólk.

Føroya Kærustovnur | Undir Hornabakka | Postsmoga 45 | 110 Tórshavn
Telefon 32 05 85 | Telefax 32 05 90 | www.kaerustovnur.fo